# Vilja steðga Schengen

**Schengen-samstarvið stríðir ímóti donsku grundlógini, heldur ein felagsskapur, sum hevur stevnt danska statinum fyri grundlógarbrot.**

SCHENGEN
*Magnus Dam*

Schengen-samstarvið, sum ætlanin er, at Danmark, Føroyar og Grønland skulu fara uppí 25. mars, skal í juni mánað standa sína roynd í Hægstarætti.

Felagsskapurin Grundlovsværn 2000 heldur, at tað stríðir ímóti donsku grundlógini, at Danmark luttekur í Schengen-samstarvinum, og hann hevur tí stevnt danska statinum fyri grundlógarbrot.

Schengen-sáttmálin loyvir politistaliðum úr øðrum evropeiskum londum at sleppa inn um danska og sostatt eisini føroyska markið at jagstra brotsmenn. Spurningurin er, um tað samsvarar við grundlógina, at fremmandir politistamyndugleikar sleppa at arbeiða á danskari jørð. Tað heldur felagsskapurin Grundlovsværn 2000 at tað ger, og hann vil hava Poul Nyrup Rasmussen at útseta ætlanirnar um at fara uppí samstarvið saman við hinum norðurlondunum 25. mars í ár.

Sakførarin hjá felagsskapinum, Christian Harlang, heitir á forsætisráðharran um at steðga á, inntil rætturin hevur talað. Málið verður ikki viðgjørt í Hægstarætti fyrrenn 18. og 19. juni, og tá hevur Danmark longu luttikið í Schengen-samstarvinum í næstan tríggjar mánaðir.

– Tað hevði samsvarað best við gamla og nútíðar rættaruppfatan, um sáttmálin ikki verður settur í verk, fyrrenn rætturin hevur talað, skrivar Christian Harlang í einum brævi til forsætisráðharran.

## Neyvan útsett

Øll norðurlondini hava avtalað, at tey skulu fara uppí Schengen-samstarvið í senn tann 25. mars, og eingi tekin eru um, at danska stjórnin fer at ganga frá hesari avtaluni. Tá ið hendan avtalan varð gjørd, visti stjórnin, at felagsskapurin ætlaði at royna málið í rættinum. Ætlanirnar vórðu ikki útsettar tá, og tað verða tær neyvan, nú tveir mánaðir eru eftir, til samstarvið fer í gongd.

Líkt er eisini til, at spurningurin um Schengen-samstarvið verður drúgvur at svara. Hægstirættur skal í juni gera av, um felagsskapurin Grundlovsværn 2000 yvirhøvur skal sleppa og royna málið í rættinum. Fær felagsskapurin viðhald, so byrjar veruliga sakarmálið helst í landsrættinum, og sama, hvat úrslit landsrætturin kemur til, so verður tað helst kært til Hægstarætt. Tað kann sostatt ganga drúgv tíð, áðrenn ein endalig avgerð liggur á borðinum.

## Løgtingið ikki liðugt

Løgtingið viðger í løtuni Schengen-samstarvið og spurningin um Føroyar skulu fara uppí 25. mars saman við Danmark og Grønland. Og eisini her heima hava tingmenn sett spurnartekin við sáttmálan, og um tað er rætt, at Føroyar fara uppí. Tann atfinningarsamasti er helst Jenis av Rana úr Miðflokkinum, sum staðiliga hevur ávarað ímóti, at Føroyar fara uppí Schengen-samstarvið.

Málið er í uttanlandsnevndini í løtuni, og hon er ikki liðug við sína viðgerð enn.



*Poul Nyrup Rasmussen skal í juni verja Schengen-sáttmálan í Hægstrætti. Ein felagsskapur heldur, at sáttmálin er brot á grundlógina*

# Fólkaatkvøðan greið í morgin



*2. november í fjør legði landsstýrið fram nýggju sjálvstýrisætlanina. Í morgin fer tað at leggja fram innihaldið av fólkaatkvøðuni*

**Í morgin fer landsstýrið at almannakunngera, hvat føroyingar skulu til fólkaatkvøðu um í næstum, og nær fólkaatkvøðan verður. Ósemja hevur verið í landsstýrinum um fólkaatkvøðuna**

FÓLKAATKVØÐA
*John Johannessen*

Hósdagin skulu vit, Føroya fólk, fáa at vita, hvat vit skulu atkvøða um á fólkaatkvøðuni í næstum.

Hetta gjørdi landsstýrið av á fundi í sokallaðu lítlu samgongu týsdagin.

Embætismannaverkið í Tinganesi hevur seinastu tíðina arbeitt við at gera sjálvstýrisleistin, sum varð almannakunngjørdur á tíðindafundi 2. november í fjør, um til lógartekst. Hetta arbeiðið er nú liðugt, og tað er í høvuðsheitum hesin lógartekstur, sum føroyingurin skal taka støðu til á fólkaatkvøðuni, sum Høgni Hoydal vil hava skal vera 25. apríl í ár.

## Landsstýrið ikki samt

Men júst spurningurin, um fólkaatkvøðan skal vera 25. apríl ella seinni skilir landsstýrið. Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin halda tað vera avgerandi neyðugt, at fólkið fær ríkiliga tíð til at fyrireika seg til fólkaatkvøðuna. Tí halda tey 25. apríl vera í so tíðliga.

Eitt annað, sum landsstýrið ikki er samt um, er áramálið, vit skulu brúka til at niðurlaga blokkin. Uppskotið frá landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum, Høgna Hoydal, leggur upp til, at vit skulu niðurlaga blokkin eftir tíggju árum. Hetta halda Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vera ov stutt tíðarskeið. Hesir báðir flokkarnir vilja hava, at ríkisveitingin skal niðurlagast eftir 15 árum.

Hesar báðar spurningarnar skal landsstýrið hava avgreiddar, áðrenn í morgin. Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á løgmanni, fyri at vita, um nakað meira var avgreitt viðvíkjandi fólkaatkvøðuni, men løgmaður sat á fundi og kundi ikki órógvast.

Alt bendir á, at landsstýrið enn ikki hevur fingið í lag nakra avtalu við donsku stjórnina um, hvussu tað kann gerast lættari at yvirtaka málsøki eftir nýggja sjálvstýrisleistinum. Landsstýrið hevði annars lovað, at hetta skuldi vera greitt, áðrenn endaliga sjálvstýrisætlanin varð løgd fyri fólkið.



# Atlantsflog skal privatiserast

**Næsta ár fer at bera til hjá privatum føroyingum og útlendingum at ogna sær partapening í almenna føroyska flogfelagnum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur góðkent eina privatiseringsætlan**



*Næsta ár fer eftir ætlan at bera til hjá viðskiftafólkum, starvsfólkum og íleggjarum at ogna sær partabrøv í Atlantsflog*

PRIVATISERING
*John Johannessen*

Nevndin í Atlantsflog hevur gjørt av, at 49 prosent av partapeninginum í føroyska flogfelagnum skulu bjóðast øðrum partaeigarum enn landskassanum.

Landskassin eigur í dag allan partapeningin í Atlantsflog, sum 75 milliónir krónur.

Í fyrstu atløgu er ætlanin, at landskassin framhaldandi skal sleppa at eiga hesar 75 milliónirnar í Atlantsflog. Ætlanin er nevniliga at hækka partapeningin í felagnum við privatum partabrøvum. Men nevnin í Atlantsflog sigur kortini í tíðindaskrivi, at tað kann koma upp á tal at selja burturav verandi partabrøvum.

## Útlendskir eigarar

Nevndin í Atlantsflogi sigur í tíðindaskrivi, at møguleiki eisini verður fyri at bjóða einum altjóða flogfelag at ogna sær týðandi ognarlut av Atlantsflog.

– Hetta skal gerast við tí fyri eygað at fáa í lag strategiskt samstarv til fyrimuns fyri bæði feløgini, sigur Eyðfinnur Jacobsen, nevndarformaður í tíðindaskrivi.

Ætlanin um at privatisera part av Atlantsflog er góðkend av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnu- og samferðslumálum.

Nevndin í Atlantsflog sigur, at tað tekur tíð at fremja eina privatiseringsætlan fyri Atlantsflog. Og tí roknar nevnin ikki við, at tað fer at bera til at bjóða viðskiftafólkum, starvsfólkum og íleggjarum at keypa partabrøv fyrr enn næsta ár.

Nevndarformaðurin í Atlantsflog:

# Endamálið er at styrkja felagið

**Ætlanin um at privatisera 49 prosent av Atlantsflog hevur ikki til endamáls at avreiða felagið, men at styrkja tað. Hetta ger Eyðfinnur Jacobsen, nevndarformaður greitt. Hann vísir á, at tað eisini er neyðugt at fáa útlendskt flogfelag sum partaeigara**



*Eyðfinnur Jacobsen, nevndarformaður í Atlantsflog*

PRIVATISERING
*John Johannessen*

Nevndin í føroyska flogfelagnum, Atlantsflog, heldur tað vera neyðugt at styrkja felagið við kapitali og við tættari samstarvi við útlendskt flogfelag.

Tí er nevndin farin undir at fyrireika eina ætlan um at hækka partapeningin við privatum partabrøvum stigvíst, soleiðis at 49 prosent av partapeninginum at enda eru á privatum hondum.

Afturat hesum heldur nevndin tað eisini vera neyðugt at bjóða einum altjóða flogfelag at ogna sær týðandi ongarlut í føroyska flogfelagnum.

Eyðfinnur Jacbsen, sum er nevndarformaður í Atlantsflog, ger greitt, at hetta ikki er ein ætlan, sum setir almenna føroyska flogfelagið í vanda.

– Vit ætla okkum als ikki at avreiða felagið, men tvørturímóti at styrkja tað. Vit hava tikið upp aftur eina ætlan, sum vit høvdu á borðinum longu í 1997. Ætlanina hava vit kunnað landsstýrismannin í Vinnumálum um, og hann hevur givið okkum grønt ljós at fyrireika hana, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

## Útlendingar uppí

Orsøkin til, at nevndin í Atlantsflog heldur tað vera neyðugt at selja part av partabrøvunum til útlendst flogfelag, er rætt og slætt tann, at nevndin heldur hetta vera neyðugt, um føroyska flogfelagið skal fylgja við í menningini innan flogferðslu.

Hetta merkir kortini ikki, at Atlantsflog ætlar, at kappingarneytar, sum til dømis Maersk skulu fáa høvi at keypa upp felagið.

– Tá vit fara út at leita eftir einum útlendskum flogfelag at seta pening í Atlantsflog, fara vit sjálvsagt at velja væl út. Síðani fara vit at samráðast við tað flogfelagið, vit halda vera best egnað, sigur Eyðfinn Jacobsen.

Nevndarformaðurin í Atlantsflog vísir á, at tað er heilt vanligt kring allan heimin, at smærri flogfeløg selja ein part til størri flogfeløg, fyri at fáa í lag avtalur um at sleppa inn á marknaðin hjá størru flogfeløgunum.

– Selja vit útlendskum flogfelag part av Atlantsflog, eru fyrimunirnir góður serkunnleiki, tøknilig vegleiðing og handilslig vegleiðing. Harafturat skapar hetta eisini møguleikar fyri at bjóða bíligari ferðaseðlar víðari út í heim, sigur Eyðfinnur Jacobsen, nevndarformaður.

Eyðfinnur Jacobsen ger greitt, at útlendskur partapeningur í Atlantsflog bæði ger tað lættari at koma inn á annan marknað og at halda fast um tann marknað, felagið hevur í dag.

## Á Virðisbrævamarknaðin

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at ætlanin um at privatisera partar av Atlantsflog enn er á fyrireikingarstøði, og at tað er upp til politiska myndugleikan at gera av, um nevndin sleppur at selja partabrøv í felagnum.

Men verður ætlanin veruleiki, skal Atlantsflog teknast á Virðisbrævamarknaðin, sum føroyingar í løtuni arbeiða við. Møguliga skal felagið eisini teknast á útlendskum virðisbrævamarknaðum.

Hetta fer at gera tað møguligt hjá feløgum og einstaklingum at keypa og selja partabrøv í felagnum, sum tey hava hug. Tískil kunnu fólk sjálv gera av, hvussu nógv, tey vinna upp á síni partabrøv.

– Hægri partapeningur í Atlantsflog fer eisini at geva okkum møguleika at gera nýíløgur, sigur nevndarformaðurin, Eyðfinn Jacobsen.